VIÐMERKINGAR

# Markleysur ungdómur

VAL05

**Jón Guttesen**
*Valevni Tjóðveldisfloksins til Fólkatingið*

Sambandsflokkurin prísar í valskránni ríkisfelagsskapinum og vísir m.a. á at 95% av føroyingum útbúnir uttanlands eru útbúnir í Danmark.

Tjóðveldisflokkurin fegnast um at ung í Føroyum í størri og størri mun velja at útbúgva seg, og royna seg, út um øll norðanlond, út um alt Europa og út um allan heim.

Føroyski ungdómurin sær at heimurin er opin, sær heimin sum sítt útbúgvingarstað og letur ikki snævurskygni stjórna valum sínum.

Tjóðveldisflokkurin hevur greiða støðu, ungdómurin skal hava frælsi at velja og møguleika at royna seg.

Føroyski ungdómurin tekur fullan lut í alheimsgerðini við sínum útbúgvingum, royndum og lívsleið.

Tjóðveldisflokkurin hevur greiða støðu. Føroyar skulu hava alheimin í sjónarringininum, trína út á altjóða pallin og taka fullan lut í alheimsgerðini.

# Send bara rokningina til mín!

**Ingi Kirke**

Eg fekk einki at vita

Fyri umleið 10-15 árum síðani fór eg og keypti mær ein fløguspælara, við dupultum bandupptakara, í einum handli i havn. Fekk eg at vita har, at eg skuldi rinda eitt útvarpsgjald, tí at hesin avspælarin tíverri hevði møguleika, fyri at móttaka ÚF? Nei, eg fekk einki at vita!

Men nú ein dagin kemur skriv frá ÚF, sum sigur at eg skal gjalda útvarpsgjald hvørt ár, tí teir siga at flest allir føroyingar eiga eitt útvarpstól.

**ÚF - hin heilaga kúgvin**

Eg veit ikki um tað er eitt krav til allar føroyingar at lurta eftir ÚF, men eg geri tað so ikki. Eg hvørki tími ella vil hoyra tað. ÚF er mær hinvegin ein plága nógvastaðni har eg komi. Eitt nú í kantinuni á arbeiðsplássinum, og í ymiskum matstovum, har hendan heilaga kúgvin (ÚF) absolutt skal vera so hart frá, at ein ikki kann tosa við onnur, og roynir ein tað fær ein at vita, at ein skal tiga.

Skal eg missa mín rætt til at sita heima og njóta tónleik, sum eg havi goldið fyri, við ein tóli, sum eg eisini havi goldið fyri, bara tí, at summir føroyingar halda ÚF vera ein dýrgrip? Eg havi hóast alt gjørt hetta í 15 ár. Skal hesin rættur nú knappliga verða tikin frá mær???

**Brúkaragjald**

Eg sigi bara fyri meg viðkomandi, so fari eg ongantíð í lívinum, at gjalda fyri nakað eg ikki lurti eftir! Hetta kann ikki vera rætt. Er tað nakar sum er samdur við mær?

Og eg fari ei heldur ongantíð, um so er, at eg eigi eitt sjónvarpstól, at gjalda eina krónu til SVF, bara tí, at hetta sjónvarp hevur møguleika fyri at móttaka SVF!

Um hesir báðir almennu stovnar absolutt skulu hava eitt lurtara- og hyggjaragjald, so lat tey í brúka hesa tænastu gjalda fyri hana - sjálvandi!

Hetta kann gerast á sama hátt sum við televarpinum. Ella má løgtingi geva hesum stovnum eina játtan á fíggjarlógini. Tað kann ikki vera meiningin, at ósek menniskju, sum ongantíð lurta og hyggja, skulu gjalda fyri hini. Og hvat við teimum, sum ikki hava so góð ráð til at gjalda hesar kr. 1500, og kr. 2000, hvørt ár? Hjá teimum sum hava eina lága inntøku, kann hetta sanniliga merkjast. Hjá løgtingslimum er hetta gjaldið sjálvandi ikki so tyngjandi!

**Hvat verður tað næsta?**

Men eg spyrji bara hvat tað næsta verður? Altso tann næsta lógin?

Skal løgtingið bara smíða lógir, sum siga, at allir føroyingar skulu gjalda limagjald til eitt nú Sumbiar Bóltfelag, so at hetta felag kann kappast á jøvnum støði við tey stóru feløgini í landinum?

Ella skulu allir føroyingar gjalda limagjald til Tórshøll, so hesin náttklubbur kann hava eina inntøku á sama støði sum hinir? Tað finnast hóast alt menniskju sum fara í Tórshøll, sjálvt um ikki øll fara har.

Hvussu langt kann løgtingið loyva sær at fara?

**Hvat við Rás 2 og hinum?**

Tað eru onnur sum klára seg fínt uttan at løgtingi skal blanda seg uppí.

Eg má siga, at mítt útvarpstól spælir ongantíð ÚF, men harafturímóti so lurti eg mangan eftir hinum rásunum. Hví skal ÚF fáa eina inntøku av teirri grund? Hetta er dundrandi órættvíst!

Skulu allir føroyingar eisini til at gjalda fyri televarpið um so er, at hetta kemur í eina peningaliga kreppu?

Enn einaferð, eg spyrji bara, hvussu langt kann løgtingið loyva sær at fara í sínum lógarsmíði?

**Hvat við mær?**

Eg haldi, at mítt persónliga frælsið er sera avmarkað, um eg ikki kann njóta tónleik heima við hús, bara tí at ÚF er til. Og somuleiðis kann eg heldur ikki njóta ein góðan film, bara tí at SVF er til.

Og hví skal eg gjalda fyri alt tað sum onnur brúka?

Kanska kann eg sleppa at gjalda vegskatt og biltrygging og húsalán fyri onkran?

Ja, kanska kann løgtingið smíða eina lóg sum gevur bileigarum og húsaeigarum loyvið til at senda rokningarnar til mín!

**Kr. 3500**

Mín fløguspælari kostaði umleið kr. 3500, og eg helt tað vera nógvar pengar tá. Minnist ikki um MVG var komið tá, men tað er ikki nóg mikið fyri løgtingið. Sambart løgtinginum so átti eg nú at havt goldið umleið kr. 23000, fyri hendan fløguspælaran! Men á prísskeltinum stóð altso kr. 3500.

Mær vitandi so fekk/fær ein ikki ein fløguspælara her á landi, uttan so at hesin eisini hevur møguleika fyri at móttaka útvarpsrásir.

**Umráðandi við nýggjari lóg**

Eg haldi, at ein lóg eigur at vera smíða, sum ikki gevur løgtinginum heimmild til, at leggja tyngjandi rokningar á fólk sum hava nokk at gjalda frammanundan. Hví skal løgtingið einsamalt gera av um ein føroyingur kann eiga ein fløguspælara ella ei? Kann ein ikki longur lurta eftir tónleiki heima við hús? Hvat er hetta fyri nakað?

Eg havi ikki bil, ei heldur hús, tí eg meti ikki, at eg havi ráð til tað. Men um løgtingið kann smíða eina lóg sum sigur at allir hinir føroyingarnir skulu gjalda fyri mítt forbrúk, so kann eg bara gera sum eg vil.

Nei, tað er tíð uppá, at brúkarin sleppur at gjalda fyri tað hann brúkar, og ikki fyri tað sum hini brúka.

**Skal løgtingið stjala frá mær?**

Og hvat við teimum tólum sum eg longu eigi? Skal løgtingið til at stjala frá sínum borgarum? Eg sigi bara, at um nakar kemur inn til mín og stjelur mín fløguspælara, so vil eg hava eina váttan og eitt endurgjald, tí eg fekk einki at vita um hetta útvarpsgjald tá eg keypti hendan avspælaran.

Tað má vera mín rættur, at hesin fløguspælarin, sum eg havi havt í 15 ár, skal vera mín framyvir. Tað kann ikki vera møguligt at koma nú, so langa tíð eftir, og stjala hann frá mær! Um tað hendir so skrivi eg aftur.

# Alternativið til ABC – er E

## Týdningur, ávirkan og framtíðin

**Heidi Petersen**
*løgtingskvinna*



VAL05

- Tá tú sum veljari til hetta fólkatingsvalið setur tín kross, er umráðandi, at tú ger tær greitt, hvat tú vilt vísa við hesum krossi, og hvørja ávirkan tín krossur kemur at hava í framtíðini.

- Vilt tú vísa, at tú heldur tað vera í lagi, at føroyskir politikarar - uttan at seta krøv - lata sín stuðul til danska Javnaðarflokkin, danska Vinstraflokkin og danska Konservativa flokkin, uttan sjálvir at fáa stórvegis politiska ávirkan og uttan at vera tiknir við upp á ráð, tá týðandi avgerðir skulu takast, er bert at atkvøða ABC. Hesir flokkar, sum hava verið umboðaðir á fólkatingi líka síðani, henda skipan varð sett í verk, men sum ikki hava megnað at gjørt vart við týðandi føroysk áhugamál og politiskt ikki hava rokkið nøkrum málum, sum styrkir um støðu okkara sum sjálvstøðug tjóð.

- Hinvegin - vilt tú sum føroyskur veljari tryggja tær, at søk føroyinga verður talað á fólkatingi, er Tjóðveldisflokkurin einasti flokkur, sum virkin fer inn og arbeiðir við upplýsing, kunning, ráðstevnum, bókaútgávum, kanningum av viðurskiftum, sum hava týdning fyri Føroyar o.s.fr. Eisini verður arbeitt í "korridorunum" við at ávirka danskar politikkarar at virka fyri føroyskum áhugamálum. Við at gera føroysk áhugamál sjónlig á fólkatingi, hevur Tjóðveldisflokkurin økt um vitanina um Føroyar og føroysk viðurskifti bæði hjá donskum politikarum og danska almenninginum. Á henda hátt verður slóðað fyri føroyskum fullveldi, og tú sum veljari fært fulla ávirkan fyri atkvøðu tína við at velja E.

- Tjóðveldisflokkurin vil samstarva, har hann fær ávirkan og mest burturúr. Tað merkir í veruleikanum, at Tjóðveldisflokkurin fer virkin inn og slóðar fyri føroyskum fullveldi á fólkatingi og eisini fer at seta krøv, um hann kemur at fáa ávirkan eftir fólkatingsvalið. Hetta merkir ikki at vit leggja okkum út í innanhýsis donsk viðurskifti, eins og vit ikki vilja hava danir at leggja seg út í innanhýsis føroysk viðurskifti. Men hetta merkir at vit seta krøv, so tú sum veljari fær beinleiðis ávirka á tína egnu framtíð. Hesi krøv eru:

- Føroyar fáa fulla tjóðskaparliga viðurkenning
- Danir vátta mótvegis ST, at Føroyar eru ein serstøk tjóð
- Danir skulu ikki draga okkum inn í ES ímóti okkara vilja
- Føroyar skulu hava formligan rætt til oljuna í undirgrundini

- So niðurstøðan er greið: Einasta alternativið til ABC - er E.

Lesið Sosialin -so eru tit við!